# taksstøðu



*Eitt er at tað kann gerast trupult at fáa tey kendu nøvnini TIL Føroya. Men trupulleikin er eisini at tey ikki er vís í at sleppa ÚR Føroyum aftur, tá tey skulu.*

# Kostar pening og prestisju

**Ein loysn uppá trupulleikan við flogferðsluni farna vikuskiftið hevði verið ein tiltaksflogvøllur. Hendan hevði ein kunna tikið til og gjørt nýtslu av, tá veðrið soleiðis spælir okkum eitt puss. - Men sannleikin er jú, at vit hava einki slíkt alternativ í dag. Tí er føroyska flogferðslan so sárbar, sigur stjórin í Atlantsflogi.**

FLOGFERÐSLA
Snorri Brend



*- At eingin matur er eftir og fólk ikki kunnu fáa sær ein kaffimunn, meðan tey bíða, - tað kann ein ikki bjóða teim ferðandi í 2006, slær stjórin í Atlantsflogi, Magni Arge fast*

Í øðrum londum hava tey fleiri flogvøllir at taka til. Har kunnu tey lættliga flyta ferðafólkini millum vøllirnar við ferjum, tokum og á annan hátt um tað gerst neyðugt.

- Men her hjá okkum steðgar alt upp. Hetta síggi eg sum eitt vandamál, slær hann fast. Verandi støða er nevniliga ikki nøktandi í framtíðini.

Hetta síðsta hava ikki minst fyriskipararnir av festivalunum í summar fingið at sanna. Teir hava í øllum førum skilt tað lívsneyðuga í at hava ein høgan regularitet á landsins einasta flogvølli!

**Til og úr Føroyum**

Um vikuskiftið var enn ein tónleikafestivalur, og tá mjørkin legðist yvir landið leygardagin máttu teir broyta og tillaga skránna í rættiliga stóran mun, tí floglíkindi ikki vóru.

Her vóru talan um rættiliga kend nøvn sum tað hevði eydnast fyrireikarunum at koma hendaveg at spæla. At talan var um kend nøvn ger so aftur tað, at tónleikahugaðu áhoyrararnir í Klaksvík fingu kunnleika og gjørdust ikki minst tilvitað um støðuna, sárbarheitina og trupulleikan hjá flogferðsluni í dag.

Fyri fyriskiparar av festivalinum kann tað tí í framtíðini gerast trupult – fyri ikki at siga ógjørligt – at fáa kend nøvn til Føroya.

Eitt er at tað kann gerast trupult at fáa tey kendu nøvnini TIL Føroya. Men trupulleikin er eisini at tey ikki er vís í at sleppa ÚR Føroyum aftur, tá tey skulu. Hetta upplivdi høvuðsnavnið á Summarfestivalinum – bólkurin The Rasmus – tá teir ikki sluppu av landinum sum ætlað. Av hesi orsøk var neyðugt hjá teimum at avlýsa eina aðra konsert um vikuskiftið.

- Slíkt kostar pening og slíkt kostar eisini prestisju. Og tá tosa vit jú bert um kend nøvn innan tónleik.

- Men fyri framtíðar Føroyar sum ferðamannaland í samband við eitt nú ráðstevnur og líknandi er tað umráðandi, at vit gera alt sum hugsast kann fyri at minka um árinið frá mjørka og vaksa um regularitetin á tryggum grundarlagi, slær Magni Arge fast.

Bjarni Djurholm um 10 gigabitnet:

# Vit fara at tosa við Føroya Tele

**Bjarni Djurholm heldur ætlanina hjá Finn Helmer vera so áhugaverda, at hon ikki bara kann fara aftur við borðinum, og tí fer hann í næstum at tosa við Føroya Tele um málið**



BREIÐBAND
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Eins og Føroya Tele var Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, á einum fundi saman við Finn Helmer, tá hann vitjaði her í summar.

- Vit høvdu ein sera áhugaverdan fund og Finn Helmer hevði eitt ógvuliga spennandi upplegg, um hansara 10 gibabitnet ætlanir.

- Tankin aftanfyri 10 gigabitnetið er sera spennandi og tiltalandi, og hugskotið er rættiliga serstakt, heldur Bjarni Djurholm, sum eisini sigur, at talan er um eina so spennandi ætlan, sum ikki kann fara aftur við borðinum uttan at verða tikin upp og viðgjørd.

Kortini er tað hansara meting, at tað er lítið sannlíkt, at landið sjálvt fer inn í eina verkætlan sum hesa.

- Her er so nógv annað virksemi í gongd, so sum skúlar, tunlar, sjúkrahús og so framvegis, men ein møguleiki kundi verið, at Føroya Tele, sum landið eigur ein part av, fer inn í eina slíka verkætlan sum hesa, sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum.

Spurdur beinleiðis um, hvat hansara næsta stig verður, er svarið hetta:

- Næsta stig okkara verður so at samskifta við Føroya Tele, tí her er ein rúgva at taka upp og sum vit mugu fáa greiði á, sigur Bjarni Djurholm at enda.

Richard Mortensen, stjóri FT samskifti:

# - Vit høvdu ein áhugaverdan fund við Helmer

**Stjórin í FT-samskifti, Richard Mortensen, váttar fyri Sosialinum í dag, at teir í summar hava havt ein fund við Finn Helmer, men hann vil ikki kom inn á staklutir í málinum**



BREIÐBAND
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Í samrøðuni við Finn Helmer í blaðnum í gjár, um hansara ætlanir hansara um at leggja 10 gigabitnet út í hvørt heim í Føroyum, kom fram, at Finn Helmer millum annað hevði verið á fundi við Føroya Tele.

Hesum kann stjórin í FT-samskifti, Richard Mortensen, eisini vátta fyri blaðnum í dag:

- Jú, tað er rætt at vit høvdu ein óformellan fund við Finn Helmer fyrr í summar. Vit taka altíð væl ímóti gestum, ið koma, og tað gjørdu vit eisini við Finn Helmer, sum vit høvdu ein áhugaverdan fund við, sigur Richard Mortensen.

Hann vil tó ikki koma nærri inn á, hvat teir tosaðu um á fundinum og hvat Føroya Tele annars heldur um ætlaninar hjá Finn Helmer, um at leggja 10 gigabitnet í hvørt heim í Føroyum.

- Vit hava ikki aðrar viðmerkingar til málið beint nú, er hansara svar, tá hann verður spurdur til hesi viðurskifti í málinum.